# Vilja hava Teistan

**Sandoyartingmennin ar, Gerhard Lognberg og Páll á Reynatúgvu, vilja hava at vita, hvussu landsstýrismaðurin í heilsumálum ætlar sær at skipa sjúkraflutningin úr Sandoynni**

SJÚKRAFLUTNINGUR
*Jákup Mørk*

Á tingið seta teir báðir tingmenninir nú fyrispurning um, hvørt Landsstýrið ætlar at niðurprioritera sjúkraflutingin úr Sandoy.

Orsøkina til fyrispurningin sigur Gerhard Lognberg vera, at Landssjúkrahúsið ikki ætlar at leingja sáttmálan við Strandferðsluna um at hava Teistan til sjúkraflutning havi eg hesar spurningar.

**Í viðmerking til fyrispurningin sigur tingmaðurin:**

- Vit vilja øll hava trygdina so góða sum gjørligt, men hetta er so avgjørt tað øvuta. Tað kann leggjast afturat, at rutan úr Sandoy er broytt til tað betra. Síðsti túrurin úr Skopun er kl. 22.30 og fyrsti túrur á morgni er kl. 06.30, so tað eru bara náttartímarnir at Teistin kemur at sigla leigutúrar. Hetta merkir eina sparing sum er útvið helvtina av teimum kr. 700.000 sum sjúkraflutningurin hevur kostað. At taka Teistan úr sjúkraflutnings skipanini er avgjørt ein niðurprioritering av sjúkraflutninginum úr Sandoynni.

Hartil vil Gerhard Lognberg hava Hans Paula Strøm at greiða frá, hvussu sjúkraflutningstrygdin kann blíva betur, tá ein flutningsmøguleiki verður tikin úr skipanini?



*Gerhard Lognberg vil hava at vita, hvussu sjúkraflutningurin úr Sandoynni framyvir skal røkjast*

*Mynd: Edvard*

## Tyrlan eingin loysn

Í sínum fyrispurningin finst Páll á Reynatúgvu serliga at ætlanunum um at lata tyrluna yvirtaka sjúkraflutningin.

- Trygga sjúkraflutningstænastan við Teistanum um Skopunarfjørð, skal sum skilst skiftast út við tyrlusjúkraflutning. Onki er at frætta frá Landsstýrismanninum um fyrimunir og vansar við broyttari sjúkraflutningsskipan, og fólkið í oynni, kommunulæknarnir, og politikararnir sum vara av eru ørkymlaði.

- Havandi í huga føroyska veðurlagið og tann veruleika at eingin góðkendur tyrlupallur er í Sandoynni, tykist sum um ætlanin er tikin úr leysum lofti, staðfestir Páll á Reynatúgvu.




# Vokalbólkurin Mpiri á konsertferð

KONSERTFERÐ
*tíðindaskriv*

Føroyski vokalbólkurin Mpiri, sum er samansettur av 13 ungum sangarum í Keypmannahavn, fer í vár at hava tríggjar konsertir í Danmark. Tann fyrsta verður mikukvøldið 4. mai í Rundatorni.

Sangskráin hevur 'Sorrig og glæde' sum tema. Kenda sálmaørindið hjá Kingo er karmurin um konsertirnar, har gleðin og sorgin í tónleiki og teksti ’vandre til hobe’. Skráin er samansett av nýggjum føroyskum kórtónleiki settur saman við donskum og evropeiskum kórtónleiki og skaldskapi. Bólkurin arbeiðir nógv við at hava ørðvísi konsertir, har til dømis improvisation, ljóðroyndir og upplestur verður blandað við kórsangi. Eisini verður arbeitt við skiftandi kóruppsetingum, rørslu og serligum búnum.

Sungin verða verk hjá Vagn Holmboe, Tróndi Bogasyni og Paula í Sandagerði, ið allir eru kend tónaskøld í Føroyum. Men eisini verk eftir til dømis Per Nørgård, Einojuhani Rautavaara, Thomas Tomkins og Tjajkovski. Á konsertini luttaka 3 slagverksleikarar, millum annað tann ungi føroyingurin Rúni Mouritsen. Farið verður tónleikaliga frá tí lívliga til tað stillføra; frá tí vakra til tað svaka; frá renesansuverkum til heilt nýskrivaðan tónleik.